**Mannagongd í sambandi við løgtingsmál at lata Løgtinginum:**

1. Uppskotið verður borið umsiting Løgtingsins í undirskrivaðum líki, og eisini sent við telduposti til logting@logting.fo, men uttan nummar. Eru fylgiskjøl við, skulu hesi eisini sendast í telduposti saman við frumritinum. Fylgiskjølini skulu vera merkt fylgiskjal 1, fylgiskjal 2 o.s.v., og hesi skulu vera í PDF-formati. Hesi fylgiskjølini eru at meta sum latin Løgtinginum endaliga, og broytingar í skjalatilfarinum kunnu ikki gerast.

2. Tá uppskotið er gjøgnumgingið í umsiting Løgtingsins, løgfrøðisliga og málsliga, fær viðkomandi stjórnarráð boð við telduposti um møguligar rættingar, hvat nummar málið fær, og at klárt er at kopiera í 3 eintøkum á báðum síðum (uttan undirskrift); eisini skulu møgulig fylgiskjøl kopierast og leggjast við hvørjum uppskoti sær. Stór uppskot og frágreiðingar skulu tó berast tinginum í 40 eintøkum, tí hesi kunnu ikki leggjast á teldilin.

3. Undirskrivað frumrit til uppskotið skal síðan berast Løgtinginum, og eisini sendast í telduposti av nýggjum, nú uppskotið hevur fingið málsnummar og møguliga er vorðið rættað. Frumritið skal ikki vera á holaðum pappíri, og skal bert vera skrivað út á aðrari síðuni. Tá uppskot verða rættað, skal dagfestingin eisini broytast. Hetta ávirkar tó ikki, nær málið er móttikið her uttan so, at uppskotið er so munandi broytt, at tað má metast at vera eitt heilt nýtt uppskot.

4. Uppskotið (frumrit, 3 avrit og teldutøka útgávan) skal vera umsiting Løgtingsins í hendi, tá tingfundur byrjar tann dagin, sum framløgan skal vera. Um kritiskar løgfrøðiligar viðmerkingar e.l. vóru til lógaruppskotið í sambandi við eftirkanningina, fer uppskotið aftur til løgfrøðingin í Løgtingsumsitingini til støðutakan, áðrenn hetta er klárt at leggja fram.

*Freistir:*
Uppskot til løgtingslógir, ríkislógartilmæli og uppskot til samtyktar skulu, fyri at verða viðgjørd áðrenn tingsetan endar, verða framløgd innan 8. mars, tvs. í seinasta lagi 7. mars, um hetta ikki er ein sunnudagur. Uppskot, sum skulu koma í gildi 1. januar, skulu verða framløgd innan 5. november, tvs. í seinasta lagi 4. november, um hetta ikki er ein sunnudagur. Hesi uppskot skulu vera umsiting Løgtingsins í hendi kl. 12.00 tann 6. yrkadagin áðrenn seinasta framløgudag. Er eingin framløgufreist, skal uppskotið vera umsitingini í hendi kl. 12.00 tann triðja yrkadagin áðrenn framløgudagin.

Um uppskotini ikki eru búgvin at leggja fyri tingið, ella munandi broytingar annars verða gjørdar í teimum aftaná, at tey eru borin tinginum, verða hesi roknað sum nýggj uppskot í mun til innlatingarfreistina.

Soleiðis samtykt á fundi í Formansskapi Løgtingsins 2. mai 2017